

## Starvsfólk til teknisku deild [endurlýsing]

Tórshavnar kommuna stendur í løtuni fyri nógvum áhugaverdum verkætlanum og anleggsarbeiðum, og tí søkja vit eftir einum nýggjum starvsfelaga, ið saman við starvsfeløgum og ráðgevandi vinnuni hevur hug og dirvi at føra hesar spennandi uppgávur út í verki.

**Arbeiðsuppgávurnar**
eru m.a. at gera uppskot og kostnaðarmetingar í sambandi við vegarbeiði umframt at standa fyri projektering, útbjóðing, eftirlit og byggiroknskapi, sum kommunan stendur fyri.

**Vit ynskja**
at tú hevur útbúgving sum byggifrøðingur ella líknandi og hevur góðar arbeiðsroyndir og royndir innan almenna fyrisiting, ið samanlagt geva neyðugan førleika at røkja starvið. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til telduforritini, ið hoyra til Microstation, Microsoft Officepakkan og Navision Attain. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja, at tú ert røkin, gongur undan í at menna tænastustøðið og dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka avgerðir og duga væl at málbera teg í skrift og talu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, avrit av prógvum o.t. og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 26. januar 2007. Merkið umsóknina „Starv á teknisku deild".

Á Teknisku deild arbeiða 12 fólk. Deildin heldur til í posthúsbygninginum saman við Byggi- og býarskipanardeildini. Arbeiðsøkið hjá teknisku fyrisitingini er millum annað at viðgera byggimál og útstykkingarloyvi umframt at standa fyri planlegging, projektering og viðlíkahaldi av øllum kommunalu vegunum og tekniskum veitingum, ið komunan hevur ábyrgd av. Harumframt hevur Tekniska deild sum høvuðsuppgávu umsiting av heilsu- og umhvørvismálum.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

SUNDA KOMMUNA

## Pedagogur til barnagarðin við Kráir í Hvalvík

Søkt verður eftir pedagogi til barnagarðin at byrja 01. februar 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Starvið at søkja er**
1 pedagogur til barnagarðin 30 t/v. ella eftir nærri avtalu.

Barnagarðurin er skipaður við 3 barnagarðsstovum, 1 vøggustovu og frítíðarskúla.

Barnagarðurin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi heilt oman til tað vælkendu stóru ánna.

**Vit ynskja**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin Pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 772021 ella 422717.

Umsøknir við avritum av prógvi verða at senda til:

*Barnagarðin við Kráir*
*FO-430 Hvalvík.*
*mail: nosi@post.olivant.fo*

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 24.01.07

**Vit átaka okkum alt mekaniskt arbeiði**

ØLL BILSLØG

**Søla av FULDA dekkum**




**BILVERKSTAÐIÐ · TLF. 50 79 77**
485 Skálafirði

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN
Smyrilsvegi 20 - Postboks 3018
FO-110 Tórshavn
Telefon (*) 35 14 48 - Telefax (*) 35 14 49

## Eykapolitistur

Eitt starv sum eykapolitistur hjá politinum á Tvøroyri er leyst at søkja.

Tænastutíðin er 6 tímar um vikuna – vanliga um kvøldið. Samsýningin er í løtuni 3.173,14 kr. um mánaðin.

Umsóknarblað fæst á politistøðini á Tvøroyri.

Umsókn verður at senda til Føroya Landfúta, postboks 3018, FO-100 Tórshavn innan 14. januar 2007.

Føroya Landfúti, Tórshavn hin 3. januar 2007

Karen Marie Olesen

# 1. fl. 2007/2008

Næmingar verða skrivaðir í 1. fl. mánadagin 8. januar kl. 13 í sangstovuni.

Havið dóps- ella navnaseðil við!

**Fuglafjarðar skúli**
Tlf. 444087

Sosialurin -har tað hendir

# Lærlingur

Vit søknast eftir einum røskum lærlingi at byrja sum skjótast.

Ein við SIT ella líknandi kann hava fyrimun.

Nærri fæst at vita við at ringja til okkara ella støkka inn á gólvi.

**Hógv Handilsvirki**
Oman á Sand 15 · FO-660 Søldarfjørður
Tel 470 400 · Fax 470 401 · hogv@hogv.fo